Kappingarárið 2021

**14. juni**



Dagsins dystarbólt letur:

# Marius Davidsen

Leikskrá nr. 8

07 Vestur

# LEIKARIN HESAFERÐ

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

Navn: **Dann Fróðason**

Føddur: **27-04-2000**

Hædd: **191 cm**

Vekt: **97 kg**

Pláss á vøllinum: **Miðverji**

Besti matur: **Búffur**

Heimsins besti fótbóltspælari er: **Christiano Ronaldo**

Onnur feløg tú hevur leikt við: **Einki**

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Høgni**

Hvør er pressarin á liðnum: **Martin Tausen**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **Eiler var ringur tá hann gekk á Glasir**



Hvør er besti teknikari á liðnum: **Martin Heiberg**

Besti tónleikabólkur: **Ed Sheeran**

Besti filmur/seria: **Prison Break**



# HUGLEIÐING

*V/ Erhard Jacobsen*

-Tað er gott at spæla fótbólt

Fótbóltur hevur rættiliga fingið fótin fyri seg, um vit so kunnu siga, tí alt fleiri íðka, bæði kvinnur og menn, gentur og dreingir. Nógv av hesum stavar frá, at tað verður alt meira gjørt vart við fótbóltin av altjóða og eisini heimligum feløgunum, sum hava við fótbóltin at gera, eitt nú FIFA og her hjá okkum fótbóltssambandinum FSF.

Vit kunnu sjálvandi flenna, tá ið vit hoyra Black Birds syngja: Á Gud, tað er hart at spæla fótbólt, tá man sær so gott út sum eg. Men fótbóltur er álvara, tí ítróttur er eitt sosialt týðandi ítriv og hevur eisini týdning fyri bæði likamligu og sálarligu heilsuna.

Eitt nú er FSF nú partur av átakinum ABC fyri sálarligari heilsu, sum Fólkaheilsuráðið stendur fyri. Og endamálið er at fáa feløg, eisini ítróttafeløg og myndugleikar, land og kommunur at skapa karmar fyri trivnaðarfremjandi virksemi. Nógv ásanna í dag týdningin at vera virkin, at vera saman og at vera hugfangaður av onkrum.

Í hesum tíðum hevur góð heilsa fingið ein alt størri týdning, og ikki minst at hvør einstakur er tilvitaður um at hava góða heilsu. Hetta er nú einki nýtt, hóast tað er nógv uppi júst nú í nýggjari tíð.

Gomlu rómverjarnir høvdu eitt hugtak sum ljóðaði, at vit áttu at biðja eftir ”Mens sana in corpore sano” eini sunnari sál í einum sunnum likami.

Í dag er idealið at røra seg, liva og eta sunt. Ja, hetta er næstan blivið til eina religión. Vit síggja tað dagliga, at fólk ganga og renna og súkkla, og standa pøst í venjingarmiðstøðum, alt fyri at síggja gott út og hava tað gott.

Ja, hetta er vorðið eitt persónligt krav. Vandin er sjálvandi, at tey, sum ikki klára at liva upp til krøvini, kunnu fara at kenna seg illa. Soleiðis sum øll nú leika í, so er einki at siga til, at tey, sum eru tjúkk ella tung á sær ella ”liva ósunt” ella spekka sær ov nógv á sofuni, hava undirlutakenslur. Soleiðis var ikki tá ið eg var ungur. Tá vart tú ikki rættur maður, um tú ikki roykti og drakk. Marlboromaðurin var hin stóra fyrimyndin. Tá var eitt av herrópunum at liva hart og doyggja ungur. Og doyði tú ungur, so vart tú heldur ikki ein byrða hjá heilsuverkinum, sum tey eldru nógv verða rópt.

Jú, víst er tað gott at duga sær hógv og hugsa um heilsuna, hóast tað eisini kann gerast í meira lagi.

Bæði grikkin Aristoteles og eisini seinni tey kristnu lærdu løgdu dent á hóvsemi, og í hesum er einki skeivt. Hóvsemi bæði tímiliga og andaliga var gott, søgdu tey. Og í samfelagsligum høpi var tað ein borgarlig dygd, at fá høvdu ov nógv og færri ov lítið. Tí ójavni og skeivleikar føra ikki til tað góða samfelagið.

Nú mugu vit eisini ansa eftir, at fótbólturin ikki fær alt uppmerksemið, tí aðrar ítróttagreinir eru eisini.

Og vit mugu eisini ansa eftir, at vit ikki gerast alt ov smøl og frelst og politiskt korrekt ella hvat alt hetta nýggja eitur. At alt snýr seg um ítrótt og tú fært ikki opnað ein portal á netinum, uttan at lesa um tann ella hin dystin, ella tann venjaran, sum er koyrdur frá, hvør hevur fingið skaða og ikki fær spælt. Tí ítróttaskaðar koma eisini fyri, og tað eiga vit eisini at gáa eftir.

Men ítróttur hevur kortini altíð verið høgt í metum - eisini tá ið Mikkjal á Ryggi yrkti ítróttasangin Á leikvøllum funnust í forðum, sum hann skal hava yrkt til eitt av ítróttafeløgunum her vesturi, og har hann í einum ørindi sigur:

*Ta ítrótt, ið teir kundu gera,*
*hana vilja vit eisini ná;*
*tann heiður, ið teir mundu bera,*
*hann vilja vit eisini fá.*

# VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Vestmek** bjóðar góða góðsku fyri góðan prís





VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17 380 Sørvágur Faroe Isands www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

sendistovan

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# UM AT FISKA GOGGUR FYRR

***Frásagt: Jóhan á Ørg (1923-1995)***
***Skrivað av bandi, Sonni Jacobsen***

“Snøri var brúkt til gággulínu og vóru tað ofta gomul skipssnørir, sum menninir høvdu fingið av skipunum, teir høvdu verið við. Tí tað vóru ikki allir sum áttu snøri at gera gággulínu við. Sum agn vórðu fiskahøvd brúkt. Teir rivu høvdini upp á tann hátt, at teir tóku alt út úr undirkjaftinum, skræddu tað niður so tað hekk í táknini, og táknan var eisini skrædd niður. Og so var snørið bregdað í undirkjaftin á høvdinum. Á línuni var so ein góður favnur ímillum hvørt høvdið. Vanliga vórðu sett eitt ella tvey fiskisnøri og vórðu tey sett fram við landinum.

Tað var eitt sindur ójavnt, tann fyrsta setan ein setti var sjáldan góð. Teir søgdu altíð at høvdini vóru ov fesk og ov hørð. Men tá tey høvdu verið nakað í sjónum, so blivu tey bleytari og moyrari og so bleiv tað lættari hjá gágguni at súgva úr høvdinum. Og settu fleiri og fleiri goggur seg á. Tað var eitt sindur ójavnt hvat ein kundi fáa á einari goggulínu og støðini ein fiskaði á vóru eisini ójøvn. Ein kundi byrja líka heimi við kaiina, sum tá var, at seta út eftir. Men fór ein út um Klyvarnar, so kom ein sjáldan heim aftur fyrr enn um kvøldið og ein hevði mat við sær, tí tað var ikki so lætt at rógva og motorur var ikki í nøkrum báti. Tað vóru sum regul fortoyningsbátarnir brúktir vóru at fiska goggur við – teir bátarnir, sum hoyrdu til hvønn motorin. Tá komið var út undir Áirnar ella út undir Rættarhamar, so plagdu menn at halda til í Selvíkum. Tá gággulína var sett, so plagdu menn at fara upp á land, onkur lá kanska eftir á bátinum og skildi gággurnar, koyrdi tað smáa út aftur og fylti upp í spannir og máldi tað. Ella gingu báðir uppi á landi ella settu seg niður. Hetta gekk allur dagurin við, fyrstu ferð sett varð, tá høvdini vóru fesk, varð sjáldan tikið upp aftur fyrr enn línan hevði staði góðar tveir tímar,




eldri høvdini vóru, styttri lat ein hana standa, ein tíma ella kanska minni, til farið varð at draga aftur. Annar sat við árarnar og hin tók upp. Hann dró fyrst línuna og tá høvdið kom upp undir vatnskorpuna, so tók hann hondina niður um høvdið og lyfti so upp, so at ein ikki misti goggu av.

Tað var eitt annað stað, har gott var at fiska goggu, tað var úti í Dýpinum, sum vit kalla, tað er frá Múlanum og út eftir, tvørtur um har allan vegin, tað var eitt gott gágguplåss og var nógv gogga at fáa har. Havi mangan verið við til at fiska har eisini. Havi eisini verið við til, at fara upp á land í Tindhólmi, í staðin fyri at fara heim um í Lambánna, heiman fyri Múla, tá fiskaði varð har úti. Ein kundi fáa upp í 20 spannir av goggu. Fiskað varð vanliga so leingi, at høvdini vóru so nógv soðin, at tey ikki kundu brúkast aftur. Tí tá nyttaðu tey einki at fiska við. Tá komið var heim aftur, so vórðu goggurnar koyrdar í gággukassar. Ein gággukassi var um ein metur langur og har var eitt skott í miðjuni, og var hann eini 18 tummar breiður og tók eini 5 spannir ella okkurt sovorðið. Vanlig koyrdi ein tvær ella hálva triðju spann í hvørt rúmið, tað vil siga fýra ella fimm spannir í ein gággukassa. Ein útróðrarbátur plagdi ofta at hava eini

(framhald á síðu 18)




# Lívið broytist

Ert tú í iva um pensjón og lívstryggingar?

BANKNORDIK

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

jn.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heill 6 metur til longdar.

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

STUÐLAR

07 VESTUR

ŠKODA





**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna
stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna
stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Nr. | Leikari | Aldur | Dystir | Mál | Minutir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Silas Eyðsteinsson | 23 | 11 | - | 990 |
| 23. | Jóannis á Steig | 24 | 11 | 1 | 990 |
| 9. | Martin Heiberg Petterson | 24 | 11 | 1 | 961 |
| 8. | Martin Tausen (L) | 31 | 10 | 1 | 900 |
| 15. | Asbjørn Heðinsson | 20 | 10 | - | 798 |
| 22. | Predrag Jeremic | 33 | 10 | 1 | 746 |
| 14. | Ragnar Weihe | 19 | 10 | 1 | 616 |
| 21. | Teitur Olsen | 22 | 9 | - | 586 |
| 4. | Dann Fróðason | 21 | 8 | - | 693 |
| 10. | Erling F. Myklebust | 24 | 8 | 1 | 616 |
| 70. | Albert Theis Nielsen | 21 | 8 | - | 358 |
| 24. | Sølvi Egilsson | 26 | 8 | 1 | 289 |
| 2. | Eiler Fróðason | 18 | 7 | 2 | 549 |
| 11. | Zoran Vojovic | 35 | 7 | - | 475 |
| 3. | Dánjal Pauli Lervig | 30 | 6 | - | 419 |
| 5. | Heine Mortensen | 30 | 6 | 1 | 409 |
| 6. | Tór-Ingar Akselsen | 40 | 4 | 1 | 323 |
| 7. | Høgni E. Nielsen | 24 | 4 | - | 122 |
| 12. | Marjus E. Nielsen | 17 | 2 | - | 16 |
| 17. | Ingi Joensen | 18 | 1 | - | 2 |
| 16. | Ari í H. Petersen | 18 | - | - | 0 |
| 18. | Brandur Heinesen | 18 | - | - | 0 |
| | Venjari: Magnus Powell | | | | |

| Leikari |
|---|
| Jan Ellingsgaard |
| Karl Løkin |
| Hans Jákup Lervig |
| Uros Stojanov |
| Gundur Petersen |
| Steinbjørn Olsen |
| Ólavur Niclassen |
| Elias Lervig |
| Sámal Joensen |
| Bogi Reinert-Petersen |
| Jens Joensen |
| Filip Djordjevic |
| Pól Jákup Lundsbjerg |
| Emil Joensen |
| Jákup Olsen |
| Martin Danielsen |
| Tóri Olsen |
| Ari Ellingsgaard |
| Petur Meinhard Lundsbjerg |
| Gunnar Christiansen |
| Líggjas Heðinsson |
| Jóhann Højbro |
| Jákup í Lambanum |
| Venjari: Ólavur Larsen |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 13 | 9 | 1 | 0 | 55 | 4 | 51 | 37 |
| 2 | Víkingur | 12 | 7 | 4 | 1 | 26 | 11 | 15 | 25 |
| 3 | HB | 12 | 7 | 3 | 2 | 31 | 9 | 22 | 24 |
| 4 | NSÍ | 13 | 6 | 3 | 4 | 22 | 17 | 5 | 21 |
| 5 | B36 | 12 | 5 | 5 | 2 | 22 | 14 | 8 | 20 |
| 6 | EB/Streymur | 12 | 3 | 3 | 6 | 12 | 20 | -8 | 12 |
| 7 | ÍF | 11 | 3 | 2 | 6 | 15 | 32 | -17 | 11 |
| 8 | 07 Vestur | 11 | 2 | 2 | 7 | 13 | 39 | -26 | 8 |
| 9 | B68 | 12 | 1 | 3 | 8 | 13 | 35 | -22 | 6 |
| 10 | TB | 12 | 0 | 2 | 10 | 6 | 34 | -28 | 2 |



CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa
Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin







FOSSÁ

FROZEN FISH
LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan
timburarbeiði

Tlf. 282710



**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
**Tlf. 332727 | Fax. 333727**

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG
J&K BETONG 31 50 60


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

(framhald av síðu 7)



4, 5 ella 6 gággukassar.

Gággukassarnir høvdu fortoyning nøkulunda á sama hátt, sum fortoyningarnir hjá motorbátunum og teir gingu allir inn á land. Í summum førum var fortoyningurin hjá bátinum brúktur, men tað var ikki so vanligt. Brúktir vóru eisini gamlir sverir endar, sum høvdu verið brúktir umborð á slupp, eitt stórskjød [viðm. partur av segli] ella okkurt sovorðiið og var okkurt tungt í endanum og so fortoyaði ein kassarnar út eftir, og gággurnar kundu halda seg heilt leingi í kassunum. Tað kundi sjálvandi henda, at tað doyði burturav, so blivu tær goggurnar koyrdar úr og so varð kassin søktur niður aftur. Eg hugsi at tær fingu okkurt at eta, av tí at kassin lá niðri á botni. Meðan kassin var nýggjur, fleyt hann sum oftast. So vóru steinar koyrdir í fyri at fáa hann at søkka. Hetta er tað stóra viðv. at fiska goggur.

Tað kundi henda, at menn læntu sær goggur, tí teir ongar áttu. Tað var nógv pátrúgv, eitt var, at ein skuldi ikki siga, takk fyri. Men tað hugsi eg var bara pátrúgv tey høvdu."


Føroya Bjór
NÚ
Í DÓS
Jolly
ORANGE
FÆST KRING
LANDIÐ


BÓNUS
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22



Dalsbø Sp/f tlf. 228991




VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

## Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð




Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL. 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



# DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 07-03-2021 | 07 Vestur - B36 | 0-2 |
| 2. | 13-03-2021 | 07 Vestur - B68 | 3-2 |
| 3. | 20-03-2021 | ÍF - 07 Vestur | 3-1 |
| 4 | 28-04-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | 1-3 |
| 5. | 11-04-2021 | HB - 07 Vestur | 7-0 |
| 6. | 14-04-2021 | TB - 07 Vestur | 2-4 |
| 7. | 25-04-2021 | 07 Vestur - Víkingur | 2-4 |
| 8. | 02-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-5 |
| 9 | 08-05-2021 | NSÍ - 07 Vestur | 1-1 |
| 10. | 13-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-9 |
| 11. | 16-05-2021 | B36 - 07 Vestur | 1-1 |
| 12. | 18-05-2021 | B68 - 07 Vestur | |
| 13. | 15-06-2021 | 07 Vestur - ÍF | |
| 14. | 20-06-2021 | Víkingur - 07 Vestur | |
| 15. | 26-06-2021 | 07 Vestur - NSÍ | |
| 16. | 27-07-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | |
| 17. | 02-08-2021 | HB - 07 Vestur | |
| 18. | 08-08-2021 | 07 Vestur - TB | |
| 19. | 15-08-2021 | EB/Streymur - 07 Vestur | |
| 20. | 22-08-2021 | ÍF - 07 Vestur | |
| 21. | 28-08-2021 | 07 Vestur - B68 | |
| 22. | 12-09-2021 | 07 Vestur - B36 | |
| 23. | 19-09-2021 | KÍ - 07 Vestur | |
| 24. | 26-09-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 25. | 17-10-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 26. | 24-10-2021 | 07 Vestur - HB | |
| 27. | 30-10-2021 | TB - 07 Vestur | |

# Familjubuffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-

(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)

## Og títt barn etur fyri einans 70,-

(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-

(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

PIZZA 67

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyks-breyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 – 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

SPEKT
løggildir
grannskoðarar

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo






HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt $CO_2$-útlát.
Ov nógv $CO_2$-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.



Við at skifta til sjóflutning er $CO_2$-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili **94%**